TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

# Gongdin

## støðan og útlit



Desember
**2024**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Innihaldsyvirlit

Fororð borgarstjórans . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **5**

Tórshavnar býráð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **6**

Nevndir í Tórshavnar býráð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **9**

Staðbundnar nevndir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **10**

Innleiðsla . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **12**

Fólkatalið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **13**

Inntøkur og útreiðslur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **17**

Tænastur til borgararnar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **19**

Íløgur og raðfestingar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **20**

Íløgur á mentanar- og ítróttarøkinum . . . . . . . . . . . . . . . . . **23**

Íløgur á tekniska økinum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **25**

Íløgur á skúla- og undivísingarøkinum . . . . . . . . . . . . . . . . . **26**

Íløgur á dagstovnaøkinum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **26**

278 milliónir til íløgur í 2025 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **26**

Fíggjarstøðan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **27**



# Fororð borgarstjórans



Høvuðsevnini fyri fíggjarætlanina 2025 eru vøkstur, fólkasamanseting og skilagóðar raðfestingar.

Tað hevur verið stór framgongd og framburður í føroyska samfelagnum hesi seinastu árini, eins og vit hava sæð í Tórshavnar kommunu. Meðan samlaða fólkatalið er vaksið nógv, er tað vaksið enn meira í Tórshavnar kommunu. Væntað verður, at fólkavøksturin heldur fram, men tilgongdin av børnum minkar.

Tað er gleðiligt, at fleiri leita sær til kommununa, men kommunan fær eisini fleiri skyldur og útreiðslur til vælferðartænastur til borgaran og skattgjaldaran í kommununi. Tað krevur skilagóðar politiskar raðfestingar.

Í fíggjarætlanini fyri komandi ár er ein stórur partur av íløguætlanini raðfest til tey eldru, eins og til børn og ung. 50 milliónir krónur eru settar av til nýtt røktarheim við røktaríbúðum, nýggjur køkur verður gjørdur á Lágargarði umframt ymsar dagføringar verða gjørdar á røktarheimsøkinum.

Somuleiðis skulu okkara børn og ung hava góðar karmar, og tí eru eisini pengar settir av til dagføringar á uttanumøkjum á skúlum og dagstovnum, frítíðarskúli verður gjørdur við Botnánna í Kollafirði, og so verður dagstovnurin á Hamrinum á Argjum útbygdur.

Tað eru góðar og neyðugar íløgur til okkara børn og okkara eldru.

Tað er umráðandi at allir borgarar kenna seg aftur í kommununi. Tað er okkara skylda sum kommuna at veita skattgjaldarunum tænastur fyri skattakrónurnar, skattgjaldarin rindar i kommunukassan.

Vit hava seinastu árini havt fleiri stórar verkætlanir í gerð, sum borgarar nú fáa gleði av.

Kortsíðan varð langhylurin tikin í nýtslu, og fyrr í ár var borgarahúsið í Kaldbak liðugt. Vit bíða spent til, at stórhøllin við Tjarnir væntandi verður liðug í februar 2025. Vit gleða okkum eisini til nýggja innkomuvegin við íbindingum og tunli, sum eisini verður liðugur tíðliga í 2025.

Eg fegnist um, at kommunan støðugt mennist, men tað hevur týdning eisini at raðfesta tað, ið vit ikki altíð geva okkum far um í tí dagliga, men sum hevur sera stóra týdning fyri okkara gerandisdag. Tí hava vit somuleiðis raðfest pengar til spillvatnsætlan, kloakkir, gongubreytir, gøtur og fríðkan av bygdum og býnum í kommununi. Eisini eru settar 8 milliónir av til orkupolitikk.

Um nøkur fá ár koma oyggjaleikirnar aftur til Føroyar. Tað verður sera spennandi, og kommunan hevur sett fýra milliónir krónur av til fyrireikingar til oyggjaleikirnar, sum vera í 2027.

Vit í politisku skipanini arbeiða við skilagóðum og skynsomum raðfestingum í vælferðina og trivnaðin hjá borgaranum í kommununi. Tað vóni eg sæst aftur í fíggjarætlanini fyri 2025.

***Heðin Mortensen,***
borgarstjóri

# Tórshavnar býráð



**Heðin Mortensen**
*Borgarstjóri*

**Flokkur:** Javnaðarflokkurin
**Nevndir:** Fíggjarnevndin og Tilbúgvingarnevndin



**Kristianna Winther Poulsen**
*Býráðslimur*

**Flokkur:** Javnaðarflokkurin
**Nevndir:** Mentamálanevndin, Trivnaðarnevndin, Heilsu- og eldranevndin og Vinnunevndin



**Annfinn Brekkstein**
*Varaborgarstjóri*

**Flokkur:** Sambandsflokkurin
**Nevndir:** Fíggjarnevndin, Mentamálanevndin, Byggi- og býarskipanarnevndin, Náttúru- og umhvørvisnevndin og Tilbúgvingarnevndin



**Súna Mørk**
*Býráðslimur*

**Flokkur:** Javnaðarflokkurin
**Nevndir:** Náttúru- og umhvørvisnevndin, Mentamálanevndin, Trivnaðarnevndin, Heilsu- og eldranevndin



**Tróndur Sigurðsson**
*Býráðslimur*

**Flokkur:** Javnaðarflokkurin
**Nevndir:** Fíggjarnevndin, Byggi- og býarskipanarnevndin, Tekniska nevnd og Havnanevndin



**Bjørg Dam**
*Býráðslimur*

**Flokkur:** Javnaðarflokkurin
**Nevndir:** Náttúru- og umhvørvisnevndin, Tekniska nevnd, Trivnaðarnevndin og Vinnunevndin



**Kári Johansen**
*Býráðslimur*

**Flokkur:** Javnaðarflokkurin
**Nevndir:** Havnanevndin, Byggi- og býarskipanarnevndin, Tekniska nevnd, Heilsu- og eldranevndin, Vinnunevndin og SEV-nevndin



**Annika Olsen**
*Býráðslimur*

**Flokkur:** Tjóðveldi
**Nevndir:** Fíggjarnevndin, Mentamálanevndin, Heilsu- og eldranevndin og Tilbúgvingarnevndin



**Birgir Nielsen**
*Býráðslimur*

**Flokkur:** Fólkaflokkurin
**Nevndir:** Havnanevndin, Heilsu- og eldranevndin og Vinnunevndin



**Gunnvør Balle**
*Býráðslimur*

**Flokkur:** Tjóðveldi
**Nevndir:** Náttúru- og umhvørvisnevndin og Trivnaðarnevndin



**Súsanna Olsen**
*Býráðslimur*

**Flokkur:** Framsókn
**Nevndir:** Byggi- og býarskipanarnevndin, Tekniska nevnd og Mentamálanevndin



**Elsa Berg**
*Býráðslimur*

**Flokkur:** Tjóðveldi
**Nevndir:** Trivnaðarnevndin, Náttúru- og umhvørvisnevndin, Havnanevndin og Vinnunevndin



**Jákup Dam**
*Býráðslimur*

**Flokkur:** Tjóðveldi
**Nevndir:** Fíggjarnevndin, Tekniska nevnd og Byggi- og býarskipanarnevndin






# Nevndir í Tórshavnar býráð

Í Tórshavnar býráð eru níggju politiskar nevndir:

**Fíggjarnevndin** umsitur fíggjarviðurskifti, starvsfólkaviðurskifti, ognir hjá kommununi, leigumál og tvørkommunalar felagsskapir. Borgarstjórin er altíð formaður í fíggjarnevndini. Formaður: Heðin Mortensen (C)

**Vinnunevndin** er ein undirnevnd hjá fíggjarnevndini og ger tilráðingar um vinnuvirksemi- og bygningar, vinnupolitik og -mál, ferðavinnu og handils- og tænastuvinnu. Forkvinna: Kristianna Winther Poulsen (C)

**Tekniska nevnd** umsitur bussleiðina, vatnveiting- og góðsku, kloakkir og vegir. Formaður: Tróndur Sigurðsson (C)

**Mentamálanevndin** umsitur dagstovnaøkið, musikskúla og kvøldskúla, býarbókasavn, ítróttaranlegg og svimjihøll. Formaður: Annfinn Brekkstein (B)

**Trivnaðarnevndin** umsitur barnatannrøkt, barnavernd, familjupolitikk og fólkaskúla. Forkvinna: Súna Mørk (C)

**Heilsu – og eldranevndin** umsitur heilsu- og umsorganartænastuna, kommunulæknaskipanina og heilsufrøðiskipanina. Forkvinna: Kristianna Winther Poulsen (C)

**Náttúru – og umhvørvisnevndin** tekur sær m.a. av brennistøðini, ruskinnsavnan, náttúru, umhvørvi og frílendi. Forkvinna: Bjørg Dam (C)

**Byggi- og býarskipanarnevndin** umsitur býarskipan, byggisamtyktir, útstykkingar, traðir og urtagarðsstykkir umframt byggimál og fríðkan. Formaður: Tróndur Sigurðsson (C)

**Havnanevndin** umsitur m.a. Tórshavnar havn, vinnuvirksemi og vinnubygningar á havnaøkinum og smábátahavnir. Formaður: Kári Johansen (C)

# Staðbundnar nevndir

Tórshavnar kommuna hevur eisini valt at hava staðbundnar nevndir fyri bygdirnar í kommununi.

Hvønn ársfjórðing hava staðbundnu nevndirnar fund um ymisk viðurskifti bygdunum viðvíkjandi. Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu er formaður í øllum staðbundnu nevndunum. Hinir limirnir í nevndunum eru ein býráðslimur og tríggir íbúgvar úr bygdunum.

Staðbundnar nevndir eru fyri:

- **Hest og Koltur**
- **Kirkjubø og Velbastað**
- **Kollafjørð**
- **Nólsoy**
- **Hvítanes**
- **Kaldbak**







# Innleiðsla

Tórshavnar kommuna leggur dent á gjøgnumskygni og opinleika. Tað skal vera lætt at kunna seg um fíggjarligu viðurskiftini, raðfestingar, íløgur v.m. hjá Tórshavnar kommunu.

Í hesum faldarunum finnur tú høvuðstættirnar í fíggjarætlanini fyri 2025, lyklatøl og innlit í fíggjarstøðuna hjá kommuni. Eisini verður greitt frá gongdini í samfelagnum, sum ávirkar politisku raðfestingarnar í kommununi.



# Fólkatalið

Gongdin í samfelagnum hevur stóra ávirkan á, hvussu fíggjarætlanin verður sett saman, og hvussu íløgur og raðfestingarnar verða býttar.

Tað gongur væl í Føroyum og fólkatalið í Føroyum er nógv vaksið seinastu árini, og størsti fólkavøkstu rin er í Tórshavnar kommunu. Fólkatalið í Tórshavnar kommunu í oktober 2024 var 23.321.

Árini 2017 til 2024 er samlaða fólkatalið í Føroyum vaksið úr 49.785 fólkum upp í 54.464 fólk. Sama tíðarskeið er fólkatalið í Tórshavnar kommunu vaksið úr 20.850 fólkum upp í 23.214 fólk[1].

Fólkatalið í øllum landinum er sostatt vaksið við 4.679 fólkum, og helmingurin ella 2.364 fólk av teimum hava valt at búseta seg í Tórshavnar kommunu.

| **Oktober** | **2024** |
|---|---|
| Tórshavn | 14.145 |
| Hoyvík | 4.663 |
| Argir | 2.561 |
| Kollafjørður | 816 |
| Velbastaður | 264 |
| Kaldbak | 254 |
| Nólsoy | 214 |
| Signabøur | 147 |
| Hvítanes | 105 |
| Kirkjubøur | 74 |
| Oyrareingir | 38 |
| Hestur | 15 |
| Norðradalur | 9 |
| Syðradalur, Streymoy | 8 |
| Kaldbaksbotnur | 7 |
| Sund | 1 |
| Mjørkadalur | - |
| Koltur | - |
| **Fólkatalið tilsamans í Tórshavnar kommunu** | **23.321** |

[1] *Gongdin í fólkatalshagtølunum er lýst við støði í hagtalsgrunninum hjá Hagstovu Føroya í september 2024. Hagstova Føroya dagførir javnan fólkatalshagtølini. Tí kunnu smærri frávik vera í tølunum í hesi frágreiðingini samanborið við nýggjastu hagtølini í hagtalsgrunninum hjá Hagstovu Føroya. Hóast hesi frávik, so eigur hetta ikki at ávirka gongdina í fólkatalssamansetingini í Tórshavnar kommunu, sum hon er lýst í hesi frágreiðing.*

**Fólkatalið 1. januar, 2017–2024**




*Kelda: Hagstova Føroya*

Samlaða fólkatalið hesi árini er vaksið við 9 prosentum, meðan vøksturin í Tórshavnar kommunu hevur verið 11 prosent.

Komandi árini fer fólkatalið í Tórshavnar kommunu at halda fram at vaksa. Framskrivingar hjá Hagstovu Føroya vísa, at nærum túsund fólk fleiri fara at búgva í Tórshavnar kommunu í 2032 í mun til 2025.



**Fólkatal**
*Alt landið*
*2017-2024*

**+4.679**
persónar
**+9%**



**Fólkatal**
*Tórshavnar kommuna*
*2017-2024*

**+2.364**
persónar
**+11%**

**Framskrivingar av fólkatalinum 1. januar, 2025–2032**




*Kelda: Hagstova Føroya*

Framrokningar vísa eisini, at talið av eldri í Tórshavnar kommunu fer at hækka, meðan barnatalið fer at lækka. Í 2032 verða tað 23 prosent fleiri fólk, sum eru 67 ár og eldri í Tórshavnar kommunu samanborið við 2025. Hinvegin lækkar smábarnatalið seks prosent sama tíðarskeið.

### Visti tú

Visti tú, at umleið ***500 kommunalar ruskspannir*** eru í Tórshavnar kommunu

### Framskriving

*Alt landið*
*2025-2032*

**+1.380**
persónar

**+2%**

### Framskriving

*Tórshavnar kommuna*
*2025-2032*

**+979**
persónar

**+4%**

## Býtið av fólkatalinum í Tórshavnar kommunu árini 2017–2032

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 17-24 | í % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 0-6 ár | 1.970 | 2.006 | 2.140 | 2.164 | 2.232 | 2.202 | 2.197 | 2.105 | 135 | 7 |
| 7-15 ár | 2.766 | 2.807 | 2.769 | 2.794 | 2.779 | 2.829 | 2.857 | 2.890 | 124 | 4 |
| 16-66 ár | 13.286 | 13.362 | 13.621 | 13.856 | 14.075 | 14.354 | 14.545 | 14.762 | 1.476 | 11 |
| Yvir 67 ár | 2.828 | 2.926 | 3.020 | 3.124 | 3.224 | 3.302 | 3.376 | 3.455 | 627 | 22 |
| **Tilsamans** | **20.850** | **21.101** | **21.550** | **21.938** | **22.310** | **22.687** | **22.975** | **23.212** | **2.362** | **11** |

| | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 | 2029 | 2030 | 2031 | 2032 | 25-32 | í % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 0-6 ár | 2.211 | 2.178 | 2.169 | 2.126 | 2.103 | 2.093 | 2.083 | 2.081 | -130 | -6 |
| 7-15 ár | 2.894 | 2.963 | 2.966 | 3.019 | 3.042 | 3.041 | 3.010 | 2.990 | 96 | 3 |
| 16-66 ár | 15.046 | 15.066 | 15.147 | 15.176 | 15.192 | 15.210 | 15.223 | 15.228 | 182 | 1 |
| Yvir 67 ár | 3.623 | 3.740 | 3.831 | 3.941 | 4.054 | 4.180 | 4.314 | 4.454 | 831 | 23 |
| **Tilsamans** | **23.774** | **23.947** | **24.113** | **24.262** | **24.391** | **24.524** | **24.630** | **24.753** | **979** | **4** |

### Visti tú

at í Tórshavnar Kommunu eru umleið ***285 kilometrar av vegum og 227 kilometrar av gongubreytum***

### Tórshavnar kommuna

Skattaprocent

**19%**

Barnafrádráttur

**9.000 kr.**

# Inntøkur og útreiðslur

Samlaða fíggjarætlanin hjá Tórshavnar kommunu er nú oman fyri 1,4 mia. kr. Vanligar rakstrarútreiðslur eru størsti parturin av samlaðu fíggjarætlanini hjá kommununi.

| *Mió kr.* | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Rokn-skapur** | **Rokn-skapur** | **Rokn-skapur** | **Rokn-skapur** | **Uppruna-játtan** | **Fíggjar-ætlan** |
| Inntøkur tilsamans | 1.139 | 1.168 | 1.239 | 1.301 | 1.316 | 1.427 |
| Rakstrarútreiðslur tilsamans | 837 | 894 | 933 | 1.012 | 995 | 1.088 |
| Aðrar útreiðslur | 24 | 21 | 32 | 38 | 50 | 48 |
| **Rakstrarúrslit** | **278** | **253** | **274** | **251** | **271** | **291** |
| Løgur | 407 | 193 | 275 | 394 | 359 | 278 |
| **RLÚ-úrslit** | **-129** | **60** | **-1** | **-143** | **-88** | **13** |

Løgurnar eru ein minni partur av árligu útreiðslunum, men tær kunnu sveiggja nógv frá ári til ár. Løgurnar hava sveiggja í millum góðar 400 mió. kr. og smáar 200 mió. kr. árini frá 2020 til 2025.

Nógv tann størsti parturin av inntøkunum hjá Tórshavnar kommunu er kommunuskattur, sum er vanligur lønarskattur. Harnæst skattur av eftirlønargjøldum, og síðani kemur felagskattur. Kommunurnar fáa endurgjald frá landinum fyri DIS, FAS og aðrar frádráttir. Frá 2025 fáa kommunurnar eisini part av veiði- og tøkugjøldunum.




Stóri fólkavøksturin hevur við sær fleiri inntøkur. Hinvegin vaksa útreiðslurnar eisini. Ein orsøk er lønar- og príshækkingar, men ein onnur orsøk er eisini, at tørvurin á tænastum veksur, tá ið fólkatalið veksur, eins og at tørvurin broytist, tá fólkasamansetingin eisini broytist.

Stórur partur av rakstrarútreiðslunum seinastu árini er farin til almanna- og heilsumál. 32 prosent av rakstrarútreiðslunum hava verið til almanna- og heilsumál, har størsti parturin er eldra- og umsorganarøkið. Harafturat fevnir økið um barnavernd, barnatannrøkt og kommunulæknahøli. Seinastu árini eru rakstrarútreiðslur til integratión komnar afturat.

Økið børn og ung er eisini ein stórur partur av rakstrarútreiðslunum. Seinastu árini hava 24 prosent av rakstrarútreiðslunum verið til tilboð á barna- og ungdómsøkinum, sum eru vøggustovur, barnagarðar, frítíðarskúlar og forskúlar.

Fimm prosent fara til undirvísing, sum er raksturin av fólkaskúlunum. Læraralønir eru ikki við, tí tær rindar landið.

| *Mió kr.* | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Rokn-skapur** | **Rokn-skapur** | **Rokn-skapur** | **Rokn-skapur** | **Uppruna-játtan** | **Fíggjar-ætlan** |
| Kommunuskatttur | 891 | 901 | 951 | 1.003 | 1.013 | 1.101 |
| Felagsskattur | 55 | 63 | 68 | 62 | 58 | 58 |
| Skattur av eftir-lønargjøldum | 156 | 168 | 183 | 200 | 210 | 231 |
| Veiði- og tøkugjøld | | | | | | 1 |
| Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir | 37 | 36 | 36 | 36 | 35 | 36 |
| Aðrar inntøkur | -4 | -2 | -3 | -2 | -2 | -2 |
| **Inntøkur tilsamans** | **1.135** | **1.166** | **1.235** | **1.299** | **1.314** | **1.425** |

Mentan og frítíð fevnir um tilboðið um m.a. kvøldskúlan, musikkskúlan, býarbókasavn. Harumframt ítróttartilboð, sum svimjihøll og ítróttaranlegg. Seinastu árini hava rakstrarútreiðslurnar verið átta prosent.

16 prosent av rakstrarútreiðslunum eru nýtt til teknisk mál, sum eitt nú vegir og viðlíkahald.

Kommunal virki, sum t.d. brennistøðin, brandstøðin og Tórshavnar havn standa fyri fimm prosentum av samlaðu nettorakstrarútreiðslunum hjá Tórshavnar kommunu. Her skal tó havast í huga, at Tórshavnar kommuna hevur havt nettorakstrarinntøkur svarandi til góðar 41 mió. kr. árliga frá Tórshavnar havn hesi seinastu árini. Nettorakstrarútreiðslurnar til kommunal virki høvdu tí verið góðar 41 mió. kr. størri árliga uttan Tórshavnar havn.

10 prosent eru nýtt til kommunalu fyrisitingina, sum er ovasta fyrisiting í kommununi.

**Rakstrarútreiðslur tilsamans, 2020–2025**




| | | |
|---|---|---|
| § 1 Kommunal fyrisiting | 590.055 tkr. |
| § 2 Almanna-og heilsumál | 1.832.712 tkr. |
| § 3 Børn og ung | 1.352.128 tkr. |
| § 4 Undirvísing | 304.909 tkr. |
| § 5 Mentan og frítíð | 444.254 tkr. |
| § 6 Teksnisk mál | 945.945 tkr. |
| § 7 Kommunal virki | 292.205 tkr. |

# Tænastur til borgararnar

Bróðurparturin av tænastunum hjá Tórshavnar kommunu eru almanna- og heilsutænastur og økið børn og ung.

| **Búpláss** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vanlig røkt | 136 | 145 | 145 | 145 | 145 | 145 |
| Demens | 66 | 66 | 66 | 66 | 66 | 66 |
| Umlætting | 18 | 34 | 34 | 34 | 34 | 34 |
| **Búpláss íalt** | **220** | **245** | **245** | **245** | **245** | **245** |

25 pláss eru komin afturat á eldraøkinum seinastu árini. Á eldraøkinum eru bæði vanlig røktarpláss, demenspláss og umlættingarpláss. Umlættingar- og rehabiliteringsdepilin URD varð tikin í nýtslu í 2021 og við URD komu 16 umlættingarpláss afturat. Harafturat eru 9 vanlig røktarpláss komin afturat.

Á økinum børn og ung eru dagstovnar og skúlar ein stórur partur av tænastunum.

| **Virksemisyvirlit á dagstovnaøkinum** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vøggustova | 614 | 614 | 605 | 603 | 595 | 560 |
| Barnagarður | 1.148 | 1.155 | 1.139 | 1.209 | 1.215 | 1.203 |
| Frítíðarskúli | 583 | 604 | 636 | 683 | 647 | 671 |
| Forskúli | 100 | 130 | 138 | 137 | 143 | 158 |

Tilsamans ganga meira enn 3.200 næmingar í skúlunum í Tórshavnar kommunu. Talan er bæði um fólkaskúlar og frískúlar.

| **Virksemisyvirlit á fólkaskúlaøkinum** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nólsoyar skúli | 11 | 10 | 13 | 13 | 14 | 9 |
| Nólsoyar skúli, forskúlalíknandi tilboð | 2 | 5 | - | 3 | 1 | - |
| Velbastaðar skúli | 35 | 32 | 29 | 21 | 28 | 31 |
| Velbast. skúli, forskúlalíknandi tilboð | | | | | | 10 |
| Kaldbaks skúli | 21 | 24 | 24 | 23 | 25 | 29 |
| Kollafjarðar skúli | 118 | 114 | 120 | 129 | 130 | 123 |
| Eysturskúlin | 520 | 484 | 466 | 515 | 595 | 569 |
| Sankta Frans skúli | 317 | 318 | 325 | 334 | 358 | 362 |
| Hoyvíkar skúli | 330 | 321 | 349 | 355 | 360 | 349 |
| Skúlin á Argjahamri | 361 | 361 | 368 | 388 | 392 | 388 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 410 | 403 | 401 | 387 | 369 | 367 |
| Lítliskúli | 64 | 80 | 82 | 58 | 60 | 63 |
| Fnskúlin í Havn | 34 | 32 | 18 | 16 | 19 | - |
| Skúlin á Fløtum | 746 | 753 | 779 | 809 | 776 | 789 |
| Skúlin á Fløtum, forskúli | - | 45 | 47 | 55 | 64 | 66 |
| Sankta Frans skúli, forskúli | 45 | 47 | 42 | 48 | 47 | 45 |
| Skúlin á Argjahamri, forskúli | 20 | 21 | 25 | 17 | 17 | 26 |
| Lítliskúli, forskúli | 15 | 17 | 17 | 14 | 11 | 16 |

Tórshavnar kommuna veitir tænastur á mentanar- og frítíðarøkinum við m.a. Tórshavnar musikkskúla og Tórshavnar kvøldskúla.

Nýggi musikkskúlin varð tikin í nýtslu í 2019, og tá øktist næmingatalið og bíðilistin minkaði, tí umstøðurnar blivu betri.

| **Virksemisyvirlit á musikkskúlanum** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Næmingatal | 1.055 | 1.069 | 1.126 | 1.761 | 1.735 | 1.745 |
| Næmingar á bíðilista | 767 | 837 | 604 | 629 | 633 | 691 |

| **Virksemisyvirlit á kvøldskúlanum** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Næmingatal | 3.064 | 2.850 | 2.475 | 2.190 | 2.660 | 2.700 |
| Lærugreinatal | 306 | 300 | 315 | 258 | 251 | 268 |
| Lærarar | 140 | 149 | 162 | 139 | 136 | 133 |
| Undirvísingarstøð í býnum | 29 | 36 | 37 | 36 | 30 | 68 |

Í 2021 og nøkur ár fram minkaði næmingatalið í kvøldskúlanum av koronufarsóttini, men nú veksur næmingatalið spakuliga aftur.

# Íløgur og raðfestingar

Árini 2017 til 2023 hevur Tórshavnar kommuna gjørt íløgur fyri góðar 2,2 milliardir krónur. Hesi árini er størsti parturin av íløgukrónunum farnar til Tórshavnar havn, síðan kemur Skúlin á Fløtum, langhylurin, innkomuvegurin og Musikkskúlin.

Í 2024 er størsti parturin av íløgukrónunum farnar til nýggja innkomuvegin. Við í hesum eru íbindingarvegir og annað. Síðan kemur langhylurin, stórhøllin við Tjarnir, framhaldsdeildin í Sankta Frans skúla og Dagstovnurin á Hamrinum. Hetta eru stórar íløgur, sum eru lidnar ella um at vera lidnar.

| **Topp 5 íløgur frá 2017 til 2023** | |
|---|---|
| Tórshavnar havn | 29% |
| Skúlin á Fløtum | 20% |
| Langhylur | 8% |
| Innkomuvegur | 8% |
| Musikkskúlin | 4% |

| **Topp 5 íløgur í 2024** | |
|---|---|
| Innkomuvegur v/íbindingum | 47% |
| Langhylur | 13% |
| Stórhøll | 9% |
| Framhaldsdeild í Sankta Frans skúla | 5% |
| Dagstovnurin á Hamrinum | 4% |



Framhaldsdeildin hjá Santa Frans skúla




Nýggi langhylurin



Nýggja Stórhøllin
ið rúmar 4.700 áskoðarar



Dagnstovnurin á
Argjahamri



Nýggja fimleika- og
borgarahøllin í Kaldbak





# Íløgur á mentanar- og ítróttarøkinum

Seinastu árini eru fleiri íløgur gjørdar á mentanar- og ítróttarøkinum. Ein av størstu íløgunum er stórhøllin við Tjarnir uppi í Hoyvík. Høllin er í trimum hæddum og hevur eina samlaða gólvvídd upp á 8.100 fermetrar. Hetta er einasta høll av sínum slag í Føroyum. Høllin rúmar upp ímóti 4.700 áskoðarum, alt eftir hvussu uppsetingin er.

Við høllini kunnu Tórshavnar kommuna og Føroyar bjóða seg fram á altjóða pallinum, tá tað ræður um ráðstevnur, ítrótt, konsertir og annað. Í høllini verður virksemi, ið væntandi eisini fer at hava ágóðar við sær fyri annað vinnulív í Tórshavnar kommunu. Høllin við Tjarnir verður tikin í nýtslu tíðliga í 2025.

Langhylurin í Gundadali er eisini ein stór kommunal íløga. Langhylurin gevur føroyskari svimjiítrótt umstøður á altjóða støði. Langhylurin læt upp fyri almenninginum í november 2024.

Fimleika- og borgarahøllin í Kaldbak er liðug. Høllin fer at geva bygdarfólkinum góðar umstøður til ítrótt, mentan og annað skúla- og frítíðarvirksemi.

**Visti tú**

at í 2025 fara ***6.160 børn*** og ung millum 0 og 18 ár at fáa ***ókeypis tannlæknarøkt*** í Tórshavnar kommunu

## Faktaboks

Á hvørjum ári letur Tórshavnar kommuna virðislønir M.A Jacobsens og Barnamentanar-heiðursløn Tórshavnar býráðs.

Í 2024 vórðu virðislønar latnar hesum:

Virðisløn M.A. Jacobsens fyri yrkisbókmentir 2024 varð latin Andrassi Mortensen fyri bókina *Kongsbókin og lógir føroyinga í hámiðøld.*

Virðisløn M.A. Jacobsens fyri fagrar bókmentir 2024 varð latin Vónbjørt Vang fyri bókina *Svørt Orkidé.*

Virðisløn M.A. Jacobsens fyri mentanaravrik 2024 varð latin Dagmar Joensen-Næs.

Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs 2024 varð latin Elini Michelsen fyri tríverkið *Rimarúmið, Vanvarði og Feigdarfræ.*

## Faktaboks

Í 2024 varð søgulig standmynd avdúkað í Steinatúni, tí talan er um fyrstu standmynd í Tórshavnar kommunu av navnnevndari kvinnu.

Standmyndin er til minnis um Andreu Árting, sum var undangongukvinna, tá ið tað ráddi um, at kvinnur skuldu hava somu løn sum menn fyri sama arbeiði. Andrea var forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag í 40 ár.

Andrea Árting tók eisini stig til, at kvinnur fóru at rógva kapp á ólavsøku.



Innkomuvegurin til Havnar



# Íløgur á tekniska økinum

Innkomuvegurin er størsta íløgan hjá Tórshavnar kommunu seinnu árini á tekniska økinum.

Vegurin gongur av Hvítanesi niðan til Hoyvíkar, haðani ein tunnil gongur undir Oyggjarvegnum og kemur út í Marknagili. Tunnilin varð skotin ígjøgnum í apríl 2024. Vegurin letur upp fyri ferðslu í apríl 2025.

Við innkomuvegnum verður partur av ferðsluni leiddur út um Havnina, meðan ferðslan, sum skal inn í Havnina, verður leidd inn í býin við fleiri íbindingarvegum.

Ein av smærru, men týdningarmiklu íløgunum á tekniska økinum er nýggja bíðirúmið í Hesti, sum varð tikið í nýtslu í oktober 2024. Við hesum verða umstøðurnar hjá fólki, ið ferðast aftur og fram millum Hest og Gomlurætt munandi betri.

### Visti tú

Visti tú, at umleið ***8.500 gøtuljós*** eru í Tórshavnar kommunu

# Íløgur á skúla- og undivísingarøkinum

Á undirvísingarøkinum er nýggi bygningurin til hádeildina hjá Santa Frans skúla ein íløga, sum fer at tryggja skúlanum í miðbýnum góðar umstøður komandi nógvu árini.

# Íløgur á dagstovnaøkinum

Útbyggingin av dagstovninum á Hamrinum á Argjum verður liðug í 2025. Útbyggingin fevnir um 6 stovur. Harumframt eru ymsar íløgur gjørdar í tillagingar á dagstovnaøkinum hesi seinastu árini.

# 278 milliónir til íløgur í 2025

Farið verður nú undir nýtt fíggjarár. Tórshavnar býráð hevur samtykt fíggjarætlanina fyri 2025. Sambært henni eru knappar 278 milliónir krónur settar av til íløgur í Tórshavnar kommunu í 2025.

Raðfestingar verða gjørdar á fleiri økjum, soleiðis at Tórshavnar kommuna er brynjað til framtíðina.

**Raðfestingar á almanna- og heilsuøkinum**

Á almanna- og heilsuøkinum verður farið í holt við at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum í Hoyvík. Tað fer væntandi at taka trý ár at byggja heimið liðugt.

Nýggjur køkur verður gjørdur á Lágargarði, og harumframt verða ymsar dagføringar gjørdar á røktarheimsøkinum.

**Raðfestingar á barna- og ungdómsøkinum**

Á barna- og ungdómsøkinum verður frítíðarskúli gjørdur við Botnánna í Kollafirði. Dagstovnurin á Hamrinum á Argjum verður útbygdur, umframt at peningur er settur av til uttanumøki og aðrar tillagingar á dagstovnaøkinum.

**Raðfestingar á undirvísingarøkinum**

Peningur er eisini settur av til dagføringar av Hoyvíkar Skúla, umframt uttanumøkini við skúlarnar í kommununi.

**Raðfestingar á mentanar- og frítíðarøkinum**

Oyggjaleikir verða í Føroyum í 2027, og tí er peningur settur av til fyrireikingar í sambandi við Oyggjaleikirnar.

Eisini er peningur settur av til  felagshús og skýli til FC-Hoyvík. Harumframt eru 15 mió. kr. settar av til stórhøllina við Tjarnir, sum væntandi verður liðug í februar 2025

**Raðfestingar á økinum kommunal virki**

Dagføringar av renovatiónsøkinum verða framraðfestar í fíggjarætlanini 2025, soleiðis at kommunala brennistøðin verður dagførd og brynjað til at lúka herdu krøvini, sum standa fyri framman á burturkastøkinum.

**Raðfestingar á tekniska økinum**

Nú fólkavøkstur er í kommununi, mugu fleiri útstykkingar útvegast. Talan er bæði um at skipa nýggju bústaðarútstykkingarnar í kommununi soleiðis, at tær ikki bert eru til sethús, men eisini til aðrar bústaðir, t.d. leigubústaðir. Hædd verður eisini tikin fyri ymsum slag av bústøðum, umframt at bústaðirnir kunnu vera ymiskir í støðd.

Á tekniska økinum er peningur eisini settur av til kloakkir, spillivatnsætlan, orkupolitikk, vegaverkætlanir, gongubreytir, gøtur og fríðkan av bygdum og bý í kommununi.

Býráðið hevur samtykt at játta íløgur fyri tilsamans 277,5 mió. kr. í 2025, men samlaða íløguvirksemið er størri. Tórshavnar kommuna leggur út fyri útstykkingar til bæði bústaðarbygging og útstykkingar til vinnulig endamál.

Útleggini hjá Tórshavnar kommunu til grundstykkir til bústaðir og vinnulig endamál eru oman fyri 150 mió.kr., men hesin peningurin kemur sum frá líður inn aftur, og útstykkingar eru tí útreiðsluneutralar fyri kommununa, tá ið grundstykkini eru endaliga avgreidd og seld. Útleggini fevna um bústaðargrundstykkini á Argjahamri og Stórutjørn umframt vinnustykkini á Ovara Hjalla.

| Íløgur í Tórshavnar kommunu í 2025 | Tús. kr. |
|---|---|
| **Almanna- og heilsumál** | **62.000** |
| Nýtt røktarheim við røktaríbúðum | 50.000 |
| Dagføringar av røktarheimum | 2.000 |
| Nýggjur køkur á Lágargarði | 10.000 |
| **Børn og ung** | **62.000** |
| Útbygging av dagstovninum á Hamrinum | 35.000 |
| Frítíðarskúlin við Botnánna | 19.000 |
| Tillagingar á dagstovnaøkinum | 4.000 |
| Uttanumøki við dagstovnar | 4.000 |
| **Undirvísing** | **12.000** |
| Dagføringar og útbyggingar í Hoyvíkar skúla | 10.000 |
| Uttanumøki við skúlarnar | 2.000 |
| **Mentan og frítíð** | **32.000** |
| Golfvøllur á Glyvursnesi | 5.000 |
| Stórhøllin við Tjarnir | 15.000 |
| Býarsavn í Gamla Hospitali | 2.000 |
| Felagshús við skýli hjá FC-Hoyvík | 3.000 |
| Skiftingarrúm í fimleikahøllini í Finsen | 1.000 |
| Frælsur ítróttur | 2.000 |
| Oyggjaleikir 2027 | 4.000 |
| **Teknisk mál** | **51.500** |
| Orkuloysnir til kommunalar bygningar | 8.000 |
| Fríðkan av bygdum og økjum | 1.500 |
| Fríðkan av býnum | 2.000 |
| Kirkjugarðar | 4.000 |
| Vatnveiting | 2.000 |
| Kloakkir og spillvatn | 15.000 |
| Vegaverkætlanir | 7.000 |
| Parkeringsviðurskifti | 1.000 |
| Gongubreytir | 3.000 |
| Vegagerð í Kaldbak | 1.500 |
| Vegagerð á Velbastað | 1.500 |
| Rakstrargøgn | 5.000 |
| **Kommunal virki** | **58.000** |
| Renovatión | 13.000 |
| Tórshavnar havn | 42.000 |
| Smábátahavnir | 3.000 |
| **Íløguætlan tilsamans** | **277.500** |

# Fíggjarstøðan

Fíggjarstøðan hjá Tórshavnar kommunu er góð. Sambært lóggávuni kann netto kommunuskuldin í mesta lagi vera ein álíkning. Fyri Tórshavnar kommunu hevði tað svarað til meira ein 1,4 milliardir krónur í nettoskuld. Nettoskuldin hjá Tórshavnar kommunu er niðan fyri 30% av einari álíkning.




At fíggjarstøðan í kommununi er góð hevur nógv at siga fyri møguleikarnar í kommununi. Nakrar avbjóðingar liggja fyri framman, serliga at fólkasamansetingin broytist, og at vit gerast fleiri í kommununi. Tað hevur við sær fleiri inntøkur, men eisini fleiri skyldu og broyttan tørv á tænastum í kommununi. Við verandi fíggjarstøðu er kommunan væl brýnd til tað, ið liggur fyri framman.

[2] *November 2024*

MEITILBERG

TORSHAVNAR KOMMUNA